NUMO

# Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

**C/o Landsbanki Føroya**
**Kvíggjartún 1**
**FO-160 Argir**

## Ársfrásøgn fyri 2017

**Avrit**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á stýrisfundi grunsins hin 22. mai 2018

---

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Váttanir frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um grunnin | 4 |
| Leiðslufrágreiðing | 5 |
| **Ársroknskapur** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 7 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2017 | 10 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2017 | 11 |
| Notur til ársfrásøgnina | 13 |

# Leiðsluátekning

Stýrið hevur í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2017 fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við góðan roknskaparsið og sambært §§ 13 – 15 í stýrisskipan fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Vit meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu grunsins tann 31. desember 2017 umframt av grunsins virksemi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2017.

Vit meta, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenningar á stýrisfundinum.

Argir, tann 22. mai 2018

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Malan Johansen<br>forkvinna | Marita V. Rasmussen | Georg F. Hansen |

# Váttanir frá óheftum grannskoðara

*Til kapitaleigararnar í Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin*

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2017 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapur, fíggjarstøða og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir góðum roknskaparsiði og sambært §§ 13 – 15 í stýrisskipan fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við góðan roknskaparsið og sambært §§ 13 – 15 í stýrisskipan fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera ársroknskapurin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember og av úrslitinum av virksemi grunsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2017 samsvarandi góðan roknskaparsið og sambært §§ 13 – 15 í stýrisskipan fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

# Váttanir frá óheftum grannskoðara

## Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava, sum ásett í lóggávuni, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, 22. mai 2018

NUMO
Góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

Símun Absalonsen
Statsaut. revisor

# Upplýsingar um grunnin

| | |
|---|---|
| **Grunnurin** | Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin<br>C/o Landsbanki Føroya<br>Kvíggjartún 1<br>FO-160 Argir<br><br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember |
| **Stýri** | Malan Johansen, forkvinna<br>Marita V. Rasmussen<br>Georg F. Hansen |
| **Grannskoðan** | NUMO<br>Góðkent grannskoðanarvirki Sp/f<br>Undir Bryggjubakka 13<br>100 Tórshavn |

# Leiðslufrágreiðing

## Virksemi

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 við seinni broytingum.

Grunnurin hevur til endamáls at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn. Fæ grunsins verður fingið til vega við, at allir persónar undir 67 ár rinda grunninum 2,25% av teirra árligu skattskyldugu inntøku, og allir arbeiðsgevarar rinda 2,25% av útgoldnum A inntøkunum.

Stovnurin fór undir regluligar útgjaldingar til persónar yvir 67 ár tann 1. apríl 1997. Við broytingini hevur persónurin rætt til eftirløn, tá hann hevur fylt 67 ár, annaðhvørt hann býr í Føroyum ella uttanlands.

## Fíggjarlig lýsing

Inntøkurnar til AMEG vóru 428,4 mió. kr. í 2017, góðar 25 mió. kr. hægri samanborið við 2016.

Útgjøldini í 2017 vóru nærum 384 mió. kr. ella 24 mió. kr. hægri enn fyri 2016.

Annar kostnaður og starvsfólkakostnaður vóru 3,4 mió. kr. í 2017, sum er nakað minni enn í 2016, tá tær vóru 3,5 mió. kr.

Úrslit áðrenn fíggjarpostar er í 2017 eitt avlop uppá 40,9 mió. kr., sum er 1,4 mió. hægri enn í 2016. Ársúrslitið í 2017 gjørdist eitt avlop á 96,0 mió. kr., meðan ársúrslitið í 2016 var eitt avlop uppá 83,9 mió. kr. Hægra avlopið í 2017 er bæði tí at bruttoúrslitið er betri, og tí at fíggjarliga avkastið er betri í 2017 samanborið við 2016.

Eftir hetta verður eginogn grunsins pr. 31. desember 2017 1,4 mia. kr., samanborið við eina eginogn við ársenda 2016 á 1,3 mia. kr.

Útgjaldið til einstaka pensjónistin við fullari pensjón var 4.025 kr. um mánaðin í 2017, ella 48.300 kr. fyri alt árið. Fyri 2018 er mánaðarliga útgjaldið ásett at vera 4.145 kr. í fyrsta umfari. 30. apríl 2018 er tó lógarbroyting framd og har verður ásett, at inngjaldið til grunnin fyri alt 2018 er 2,5% fyri bæði persónar og arbeiðsgevarar. Tí verður í mai mánað roknað av nýggjum og nýtt útgjald ásett fyri 2018.

# Leiðslufrágreiðing

## Framtíðin

Búskaparliga gongdin í Føroyum hevur stóra ávirkan á inngjøldini til grunnin, og eitt vaksandi tal av eftirlønarmóttakarum hevur ávirkan á útgjaldingina. Búskapurin gongur væl í løtuni, og arbeiðsloysið var í mars 2018 bert 2,4%.

Harumframt hevur løgtingið júst samtykt, at inngjaldið í grunnin skal hækka. Tað er 2,5% í 2018 og tað verður hækkað upp í 3% í 2019 bæði fyri persónar og fyri arbeiðsgevarar.

Tað er altíð ilt at meta um avkast, og serliga nú tað er líkt til, at 2018 verður eitt væl meira ófriðarligt ár á fíggjarmarknaðinum, samanborið við 2017. Avkastið fram til 7. mai 2018 er higartil negativt, -0,13%. Tó vænta flestu íløgurøktarar vit samskifta við, at árið endar positivt.

## Hendingar eftir roknskaparárslok

30. apríl 2018 er lógarbroyting lýst fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Umframt fleiri tekniskar broytingar, so er inngjaldið í grunnin broytt, bæði fyri 2018 og 2019 og somuleiðis er nú galdandi, at øll sum búgva í Føroyum, og hava havt fastan bústað í 3 ár í Føroyum millum tey eru 15 og 67 ár fáa fult útgjald. Soleiðis verður brotpensjón tí bert galdandi fyri tey sum búgva uttanlands, so framt tey uppfylla krøvini til at fáa útgjald. Neyðugt er at seta broyttu fortreytirnar inn í búskaparliga modellið og tað arbeiðið er í gongd. Broytingarnar koma at ávirka bæði inntøkurnar í grunnin og tí eisini útgjaldið úr grunninum.

# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin fyri 2017 er gjørd í samsvari við góðan roknskaparsið og sambært §§ 13 - 15 í stýrisskipanini fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

Ársfrásøgnin fyri 2017 er gjørd í donskum krónum.

### Um innrokning og virðisáseting

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Harumframt verða virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum innroknaðar. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skylduni kann gerast upp álítandi.

Til at byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri fyri einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

## Rakstrarroknskapurin

### Nettoinntøka

Inntøka grunsins - arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið - er fyri løntakarar gjørt upp sum 2,25% (2016: 2,25%) av árligu skattskyldugu inntøkuni sambært fyribilsskattaskránni, umframt javningar av inngjøldum undanfarin ár.

Við roknskaparlok er ikki gjørligt at gera upp inntøkurnar fyri roknskaparárið endaliga, tí grundarlagið undir inntøkunum ikki er tøkt, við tað at sjálvuppgávurnar hjá persónum, sum inntøkurnar verða uppgjørdar eftir, ikki eru tøkar.

## Nýttur roknskaparháttur

Hesar uppgerðir verða tí gjørdar í eftirfylgjandi roknskaparári. Broytingarnar eru tó ikki av eini tílíkari støðd, at tær hava týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

Fyri arbeiðsgevarar er eftirlønargjaldið gjørt upp sum 2,25% (2016: 2,25%) av árligu útgoldnu A-inntøkuni.

### Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn

Kostnaðurin fyri arbeiðsmarknaðareftirløn er lógarbundna útgjaldingin til pensjónistar í roknskaparárinum.

### Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um lønir, íroknað frítíðarløn og eftirlønir umframt aðrar kostnaðir til sosiala trygd v.m. til starvsfólk felagsins. Móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum eru drigin frá starvsfólkakostnaðinum.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir fevna um kostnaðir til fyrisiting, útreiðslur til umsiting av ognum grunsins, umframt annan kostnað.

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentur, kursvinning og -tap viðvíkjandi virðisbrøvum, skuld og flytingar í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum.

### Skattur av ársúrslitinum

Grunnurin hevur, vísandi til løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, ikki skattskyldu.

## Fíggjarstøðan

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís.

Niðurskriving verður gjørd móti væntaðum tapi, tá ið tað verður mett at vera ein óvildug ábending um, at ein áogn ella áognarbólkur eru minkað í virði. Er ein óvildug ábending um, at ein einstøk áogn er virðisminkað, verður henda áogn niðurskrivað.

# Nýttur roknskaparháttur

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, ið eru innroknaðar sum ogn í umferð, fevna um goldnar kostnaðir viðvíkjandi komandi roknskaparárum.

### Virðisbrøv og kapitalpartar

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið fevna um børsskrásett partabrøv og lánsbrøv, verða virðisásett til dagsvirði fíggjarstøðudagin. Ikki børsskrásett virðisbrøv verða virðisásett til dagsvirði grundað á eitt roknað kapitalvirði.

### Tøkur peningur

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv við eini gildistíð minni enn 3 mánaðir og sum uttan forðing kunnu vekslast til tøkan pening, og har vandin fyri virðisbroytingum er ótýðandi.

### Skyldur

Skyldur verða virðisásettar til nettorealisationsvirði.

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2017

| | Nota | 2017<br>kr. | 2016<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **Nettoinntøka** | 1 | **428.528.636** | **403.190.369** |
| Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn | | -383.997.813 | -359.996.726 |
| Aðrir uttanhýsis kostnaðir | | -3.445.538 | -3.493.820 |
| **Bruttoúrslit** | | **41.085.285** | **39.699.823** |
| Starvsfólkakostnaður | 2 | -197.810 | -183.571 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **40.887.475** | **39.516.252** |
| Fíggjarligar inntøkur | 3 | 55.114.493 | 44.362.118 |
| **Ársúrslit** | | **96.001.968** | **83.878.370** |
| Fluttur vinningur | | 96.001.968 | 83.878.370 |
| | | **96.001.968** | **83.878.370** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2017

| | Nota | 2017<br>kr. | 2016<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **Ogn** | | | |
| Áogn av sølu og tænastum | | 50.900.935 | 50.184.397 |
| Tíðaravmarkingar | | 33.483.722 | 35.596.132 |
| **Áogn** | | **84.384.657** | **85.780.529** |
| Virðisbrøv | 4 | 1.289.953.325 | 1.211.102.801 |
| **Virðisbrøv** | | **1.289.953.325** | **1.211.102.801** |
| **Tøkur peningur** | | **14.332.126** | **6.022.339** |
| **Ogn í umferð til samans** | | **1.388.670.108** | **1.302.905.669** |
| **Ogn til samans** | | **1.388.670.108** | **1.302.905.669** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2017

| | Nota | 2017 kr. | 2016 kr. |
|---|---|---|---|
| **Skyldur** | | | |
| Fluttur vinningur | 5 | 1.388.666.529 | 1.292.664.561 |
| **Eginogn** | | **1.388.666.529** | **1.292.664.561** |
| Vøru- og tænastuskuld | | 3.579 | 59.418 |
| Onnur skuld | | 0 | 10.181.690 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **3.579** | **10.241.108** |
| **Skuld til samans** | | **3.579** | **10.241.108** |
| **Skyldur til samans** | | **1.388.670.108** | **1.302.905.669** |
| Eventualskyldur v.m. | 6 | | |
| Veðsetingar og trygdarveitingar | 7 | | |

# Notur til ársfrasøgnina

| | | 2017 kr. | 2016 kr. |
|---|---|---|---|
| 1 | **Nettoinntøka** | | |
| | Eftirlønargjald, løntakarar | 225.961.599 | 211.457.689 |
| | Eftirlønargjald, arbeiðsgevarar | 202.567.037 | 191.732.680 |
| | **Nettosøla til samans** | **428.528.636** | **403.190.369** |
| 2 | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Lønir | 194.210 | 180.166 |
| | Onnur lønartengd gjøld | 3.600 | 3.405 |
| | | **197.810** | **183.571** |
| 3 | **Fíggjarligar inntøkur** | | |
| | Avkast, lánsbrøv | 20.903.227 | 35.234.129 |
| | Avkast, partabrøv | 27.423.693 | 5.826.515 |
| | Avkast, alternativar íløgur | 5.344.031 | 1.822.288 |
| | Rentur, peningastovnar | -76.944 | -69.700 |
| | Rentur, áogn frá sølu | 238.838 | 263.217 |
| | Røkt | 1.281.648 | 1.285.669 |
| | | **55.114.493** | **44.362.118** |
| 4 | **Virðisbrøv** | | |
| | Partabrøv | 334.940.785 | 245.585.767 |
| | Lánsbrøv | 887.300.303 | 903.638.007 |
| | Alternativar íløgur | 67.712.237 | 61.879.027 |
| | | **1.289.953.325** | **1.211.102.801** |

# Notur til ársfrasøgnina

## 5 Fluttur vinningur

| | 2017 kr. | 2016 kr. |
|---|---|---|
| Fluttur vinningur primo | 1.292.664.561 | 1.208.786.191 |
| Fluttur vinningur í árinum | 96.001.968 | 83.878.370 |
| | **1.388.666.529** | **1.292.664.561** |

## 6 Eventualskyldur v.m.

Ongar aðrar skyldur hvíla á grunninum.

## 7 Veðsetingar og trygdarveitingar

Ongar ognir hjá grunninum eru veðsettar, og ongar trygdir eru veittar.